# ILT ER AT SPÁA

ATLANTIC AIRWAYS

**Ilt er at spáa** – serliga um framtíðina, segði Storm P. Men tað er júst tað, sum vit vilja hava okkara lesarar at gera.

Hvussu síggja Føroyar og umheimurin út 1. desember 2005? Við at svara teimum 18 spurningunum niðanfyri soleiðis, sum tú væntar at støðan verður, hevur tú møguleika at vinna eina vikuskiftisferð fyri tvey til Keypmannahavnar við Atlantic Airways.

Vinnarin av ferðini verður tann, sum hevur svarað flestum spurningum rætt, tá vit 1. desember 2005 fara at telja saman og samanbera við táverandi nútíðina. Stendur á jøvnum ímillum fleiri luttakarar, verður lutakast.

Svarað spurningunum, klipp hesa síðuna úr blaðnum, skrivað navn á, og send okkum hana í seinasta lagi 31. desember. 2004. So ert tú við í kappingini.

## SPURNINGARNIR:

**1** Fótbóltsliðið hjá Skála tók øll av bóli, tá teir beinanvegin í landskappingini løgdu seg á odda, og hingu við í toppinum ígjøgnum alla kappingina. Men hvussu verður næsta ár?
**Hvør verður føroyameistari komandi ár?**

❑ *HB* ❑ *B36* ❑ *Skála* ❑ *KÍ* ❑ *Eitt annað lið?*

**2** Íslendingar hava keypt seg longur og longur inn á føroyska marknaðin. Nógvar av stóru fyritøkunum eru í dag á íslendskum hondum. Kall, Miklagarður, Skipasmiðjurnar og Skipafelagið tjena øll pengar til Íslands. So hava vit eisini Kaupthing, ið er sera virkið á føroyska fíggjarheiminum. Heldur gongdin fram í 2005?
**Fer nøkur stór føroysk fyritøka á íslendskar hendur í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**3** Komandi ár verða aftur samráðingar um sáttmálan hjá arbeiðarunum. Tosað hevur verið um, at lóggivið ímóti verkføllum, sum koma oftari fyri í Føroyum enn nakra aðra staðni í heiminum, men enn er hetta ikki gjørt.
**Fara føroyingar at uppliva nakað verkfall í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**4** Jógvan á Lakjuni gjørdi bart tá hann tók avgerð um at leggja SVF og ÚF saman. Nú standa fleiri almennir stovnar fyri skotum, og teir, ið mest verður tosað um, eru Landsskjalasavnið, Landsbókasavnið og Fornminnissavnið.
**Eru Landsskjalasavnið, Landsbókasavnið og Fornminnissavnið samanløgd í desember 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**5** Og so tann klassiski...
**Er nýggi Smyril farin í sigling í desember 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**6** Tey flestu sótu sum á nálum, tá krúnprinsaparið í summar góvu síni ja. Eftir at hjúnarbandið var komið í hús, fóru tey ein túr til Grønlands, men enn hevur komandi kongurin ikki víst konu síni vøkru Føroyar.
**Kemur krúnprinsaparið til Føroya í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**7** Tíðirnar eru vánaligar fyri rækjuskipini, sum nú verða matað úr landskassanum í eitt trýára skeið. Fleiri gleðast um stuðulin, men nógv eru eisini ímóti, tí tey óttast eina endurtøku av 80'unum. Flestu føroyinngar munnu eftirhondini eisini hava mist trúnna á rækjuvinnuna.
**Verða fleiri enn 4 rækjuskip eftir í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**8** Á ólavsøku í ár var 10 mannafarsróðurin óalmindiliga spennandi. Havnarbáturin og Nólsoyingur kappaðust um FM heitið. Vágbingur gav teimum ein skarpan gang, men í allar seinastu tøkunum, megnaði Havnarbáturin at vinna.
**Fer Havnarbáturin at endurvinna føroyameistaraheitið í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**9** Oljuævintýrið byrjaði við einum braki, og Oljumálaráð varð sett alt fyri eitt. Sum árini liðu, minkaði eldhugurin tó hjá teimum flestu, og ævintýrið gjørdist fjarari fyri hvønn dag. Oljumálaráðið varð eisini avtikið aftur. Men nú olja er funnin skamt frá føroyska markinum, er dreymurin kyknaður aftur.
**Verður olja í rakstarverdum nøgdum funnin innan føroyska markið í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**10** Komandi ár verður aftur fólkatingsval. Spurningurin er kanska hvat føroyingar í grundini hava at gera á danatingi, men hvussu er og ikki, so hava vit tvey umboð har. Sum er, hava Tjóðveldið og Sambandið hvør sítt umboð. Men hvussu verður eftir valið?
**Fer Sambandsflokkurin at endurvinna sítt umboð í Fólkatinginum?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**11** TB varð liðið, ið kláraði at berja seg upp í bestu deildina í fótbólti í ár. Men hvussu leingi verður teimum lív lagað har?
**Verður TB framvegis eitt 1. deildarlið í desember 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**12** Smáu bygdirnr hava ilt við at klára seg. Útoyggjafelagið lat fyri trimum árum síðani eitt útoyggjaálit úr hendi, men har er tó framvegis einki hent á økinum. Skarvanes var seinasta bygdin, ið varð avtoftað. Nú er bert Heilbrigdið, sum støðist har. Eru aðrar smáar bygdir, ið ikki fara at klára trýstið frá størru býunum?
**Verður nøkur bygd avtoftað í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**13** Seinasta árið hevur verið sera turbulent hjá Tjóðveldisflokkinum. Bumburnar hava brostið um oyruni á formanninum, sum tí ynskti buldribassan úr Gøtu úr flokkinum. Floksting og eykafloksting hava verið, tí limirnir í flokkinum eru ikki samdir um, hvat skal gerast við bumuhóttaran úr Gøtu.
**Er Torbjørn Jacobsen framvegis limur í Tjóðveldisflokkinum í desember 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**14** Ein av okkara kendastu sangstjørnum eitur Teitur Lassen. Hann er so smátt farin at gera um seg í útlondunum, og konsertir hansara plaga at vera sera væl vitjaðar. Men hvussu langt fer hann at koma í 2005?
**Kemur Teitur á nakran útlendskan hitlista í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**15** Stoltleikin í føroyska flotanum, Norrøna, hevur borið við land tvær ferðir, síðani hon varð sett í sigling. Fyrst við einum álvarsomum óhappið, sum viðførdi rættiliga stóran skaða og síðani við einum smærri snuddi. Báðu ferðirnar á veg inn á Havnina. Ávarðað varð um hetta frammanundan, men eingin latst um vón. Fara stjórarnir í 2005 at taka hetta til eftirtektar ella fara teir at lata standa til? **Hvussu verður lagnan hjá Norrønu í 2005?**

❑ *Atløgubryggjan verður flutt inn á Sund* ❑ *Hon fer aftur at bera við land á veg inn á Havnina*
❑ *Bæði* ❑ *Hvørki*

**16** Í brátt farna ári fekk Saksaberg óvanliga stóra og feita síld á føroyskum øki. Tá varð tosað um, at hetta møguliga kundi vera Norðhavssildin, ið endiliga var afturkomin. Fara vit at merkja meiri til hesa góðu inntøkukelduna í komandi ári?
**Verður rokfiskiskapur av afturkomnu norðhavssildini í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**17** Vit hava Sissal í Big Brother, Guðruna Sólju úr Stjerne for en aften og Pætur við Keldu úr Danska Grand Prix'num, sum øll hava smakkað stjørnutilveruna á skíggjanum.
**Verður nakar føroyingur kendur úr donskum sjónvarpi í 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

**18** Hesin spurningurin var eisini við í fjør. Men hann er framvegis aktuellur. Maðurin, sum leyp á hjartað í USA, hevur júst verið frammi aftur, og tosað við sínar muslimsku viðhaldsmenn via internetið. Hann er tí framvegis ein hóttan ímóti heimsfriðinum.
**Er Osama Bin Laden tikin ella dripin í desember 2005?**

❑ *Ja* ❑ *Nei*

*Fyll út og send til Sosialin*

| Navn: | Bústaður: | Telefon: |
|---|---|---|
| | | |

Sosialurin